# Ungir menn smíða heimasíður og netskipanir

**- Endamálið hjá okkum er at verða við til at nøkta tann vaksandi tørvin hjá eintaklingum og virkjum innan internettænastur, siga teir sum eiga smápartafelagið, Krea á Skálafjørðinum**

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*

"Frá hugskoti til veruleika. Krea - tín loysn á alnótini".
Hesi eru slagorðini.

Í januar í ár stovnaðu ungir menn felagið, Sp/f Krea, á eystara

armi á Skálafjørðinum. Felagið hevur adressu Undir Kletti 3 í Saltangará.

Teir, ið standa aftanfyri felagið, eru Oddmar S. Olsen, Martin Anthoniussen, Bárður S. Hammer og Egil G. Olsen.

Felagið smíðar heimasíður fyri einstaklingar, virkir og stovnar og veitir tænastur innan internet og netkipanir.

### Drúgvar royndir

- Endamálið hjá okkum er at nøkta ein part av tí vaksandi tørvi hjá einstaklingum og øðrum innan internettænastur.

Stigtakararnir, sum hava arbeitt innan teldutøkni í fleiri ár, siga, at teir leggja serligan dent á heimasíður.

- Okkara høvuðsøkið er at smíða og menna heimasíður og annars veita internettænastur og netskipanir til okkara viðskiftafólk.

### Fleiri viðskiftafólk

Í sínum arbeiði við heimasíðum nýtir Krea serliga forritini, ASP, PHP, Access og MySQL database.

Felagið hevur longu smíðað heimasíður fyri fleiri viðskiftafólk. Av hesum kunnu nevnast AWI-Boats, Bústevnan Hús & Innbúgv, Estra, Handilshúsið, Hotel Tórshavn og Hógv Handilsvirki.

Meira fæst at vita um Sp/f Krea á www.krea.fo



*Tríggir teirra, sum standa aftanfyri felagið Krea: Oddmar S. Olsen, Martin Anthoniussen og Bárður S. Hammer*

W W W . S O S I A L U R I N . F O




## Vørumessan 2003

| Básur nr: | Virki: | Básur nr. | Virki: |
|---|---|---|---|
| 2. | Ergo & Hjálpartól | 21. | Kemilux |
| 3. | NCH v/Petur Gaardlykke | 22. | MultiKeyp Reklamulutir |
| 4. | Jógvan Weihe P/F | 23. | Anith |
| 5. | Ansni – Securitas Føroyar Sp/f | 24. | Poul Hansen P/F |
| 6. | Ansni – Securitas Føroyar Sp/f | 25. | MBM Meginfelag Búnaðarmanna |
| 7. | Tera | 26. | Poul Michelsen P/F |
| 8. | Vema Jacobsen | 27. | Poul Michelsen P/F |
| 9. | Landshandilin | 28. | EB-Heilsølan |
| 10. | Trio Import | 29. | ADC-Heilsølan |
| 11. | Føroya Bjór | 30. | Eimskip í Føroyum |
| 12. | Miriam Jensen | 31. | Foss-El Sp/f |
| 13. | Inventartænastan | 32. | Delta Elektronik Tænasta |
| 14. | Blika | 33. | Krea |
| 15. | Norðvág Heilsøla | 34. | Sirri Sp/f |
| 16. | Thomas Dam á Hálsi | 35. | LM Handilin |
| 17. | North Star Trading | 36. | Kristian Gravesen |
| 18. | Hestprent Sp/f | 37. | ORKIS |
| 18A. | Hestprent Sp/f | | |
| 19. | J.F. Kjølbro P/F | | |
| 19A. | J.F. Kjølbro P/F | | |
| 20. | Damfar | | |

**Opið er:**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19. september | 10 - 19 |
| Leygardagin | 20. september | 10 - 19 |
| Sunnudagin | 21. september | 13 - 18 |

**www.messan.fo**



# Stórur áhugi fyri Vørumessuni

**- Vit kundu hugsað okkum at brúkt bæði ítróttarhøllina á Nabbi og Gundadalshøllina, men tað eydnaðist okkum ikki at fáa báðar hallirnar samstundis. Vit hava ongantíð verið úti og "selt" okkum fyri at fáa fyritøkur at sýna fram sítt útboð. Vørumessan selir seg sjálv, og áhugin fyri sølustevnuni í ár hevur verið størri enn nakrantíð, sigur Birgir Poulsen í Saltangará sum nú á 6. ári skipar fyri vørumessu í høvuðsstaðnum**

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*

Á Vørumessuni 2003, sum verður í ítróttarhøllini á Nabbi um vikuskiftið, verða 35 framsýnarar á tilsamans 37 básum. Hetta er á leið sama tal sum seinasta ár.

Birgir Poulsen, ið er maðurin aftanfyri tiltakið, sigur, at áhugin fyri messuni í ár hevur verið ógvuliga stórur.

- Eg vil siga, at áhugin er uppaftur størri í ár enn seinasta ár, og tað taka vit sum eina váttan um, at stórur tørvur er á hesi afturvendandi messuni, sum nú hevur seks ár á baki.

Stigtakarin sigur, at tað eru fyritøkur, sum kundu ynskt sær at verið við, men sum pláss ikki er fyri á hesum sinni.

### Selir seg sjálv

- Vit hava ongantíð verið úti og "selt" okkum fyri at fáa framsýnarar. Vørumessan selir seg sjálv, og vit fegnast um aftur í ár at kunna bjóða framsýnarum og vitjandi eina áhugaverda og fjølbroytta messu í hugnaligum umhvørvi.

Birgir sigur, at tey kundu hugsað sær at brúkt bæði ítróttarhøllina á Nabbi og Gundadalshøllina til framsýningina hesaferð, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa báðar hallirnar samstundis.

So stórur, sum áhugin er, ivast hann ikki í, at tað hevði eydnast teimum at fylt báðar hallirnar og harvið hevði útboðið á messuni verið størri enn nakrantíð.

- Vit hava spælt við tankan um at seta tjald upp á Nabbi, men har er bæði vindhart og trongt. So, tað fara vit ikki at gera.

Hann heldur annars, at tað hevði borið væl til at brúkt báðar hallirnar, tí tær liggja so tætt uppat hvørji aðrari.

- Men tað verður so kanska eina aðru ferð, leggur hann aftrat.



*Hetta er sættu ferð, at Marknarføring við Birgiri Poulsen skipar fyri Vørumessu í høvuðsstaðnum.*
*- Áhugin fyri messuni í ár er størri enn nakrantíð, sigur stigtakarin.*

### Meira hugni

Birgir sigur, at tey hava valt at gera meira burtur úr hugnanum í ár, og tað er í fyrsta lagi blómuhandilin, Orkis í Saltangará, sum tekur sær av hesum.

- Orkis tekur sær av at pynta torgið, har fólk kunnu sita og hugna sær, meðan messan er. Ynskja fyritøkur, sum eru við á Vørumessuni, at hava Orkis til hjálpar, eru tey tøk til tess við sínum útbúnaði og vitan á økinum.

Stigtakarin ásannar, at Orkis er ein fyritøka, sum rættiliga ger seg galdandi á sínum øki – við hópin av møguleikum og hugskotum til síni viðskiftafólk.

Birgir sigur, at eins og seinasta ár, verður ein hugnalig og trivalig móttøka í gongini í høllini á Nabbi.

- Vit halda tað vera meira praktiskt, at móttøkan er í gondini. Her fáa tey vitjandi atgongukort og ta kunning, tey hava fyri neyðini. Trý fólk verða burtur av í móttøkuni, umframt at trý onnur verða knýtt at høllini, sum kunnu vera framsýnarum til hjálpar, sigur hann.

Tað er Dekostovan, sum aftur í ár syrgir fyri básunum, og Birgir er ógvuliga væl nøgdur við tað arbeiði, tey gera.

- Hetta eru hugnaligir og snotuligir básar, sum bæði framsýnarar og vitjandi eru fegin um, sigur hann.

### Bjarni setir

Tað verður Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum setir Vørumessuna 2003 kl. 10.15 fríggjamorgunin, 19. september.

Birgir sigur, at tað var býráðsformaðurin í Havn, Jan Christiansen, sum setti stevnuna seinast.

- Vit plaga at heita á ein politikara við tilknýti til vinnuna um at seta stevnuna, og hesaferð verður tað so Bjarni Djurholm.

Vørumessan verður opin dagarnar, 19.-21. september, fríggjadagin og leygardagin frá 10-19 og sunnudagin frá kl. 13-18, tá ið messan letur aftur.

# Norðoyggjar og alikreppan



**Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, hevur almennan fyrilestur í býráðshøllini, mánakvøldið 22. september kl. 19:00 undir heitinum: Er føroyski búskapurin á veg inn í eina kreppu?**

TÍÐINDASKRIV

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur sigur, at sjálvandi er ikki talan um eina kreppu sum vit kendu frá fyrst í 90 unum.

"»Vit kunnu tó ikki koma uttan um at talan eru um eina niðurgongd í búskapinum.

Tí er umráðandi at vit hyggja eftir hvussu henda niðurgongd kemur at raka, og hvussu tað almenna eigur at mótvirka gongdini.«

Magni sigur, at búskaparliga níðurgongdin er stórst innan aluvinnuna og tí verður hetta evnin, við atlitið til norðoyggjar, viðgjørt serstakt í fyrilestrinum mánakvøldið.

### Sjúkrahúsverkið og vinnulívið

Við á fundinum verða limir í tingbólkinum hjá Sambandsflokkinum.

Alfred Olsen, formaður í Trivnaðarnevnd løgtingsins, kemur at greiða frá støðuni innan sjúkra-húsverkið og ætlanunum hjá landsstýrinum at lækka stuðulin til smærri sjúkrahúsini. Kaj Leo Johannesen, limur í Vinnunevnd løgtingsins, kemur at greiða frá vinnusjónar-miðunum hjá Sambandsflokkinum.

### Burturlutan

Norðoya Sambandsfelag hevur móttikið umsókn frá starvsfólkum á umlættingarheiminum Dáanum, um stuðul í samband við keyp av nýggjum bussi.

Í hesum sambandi hevur nevndin avgjørt at skipað fyri burturlutan í samband við tiltakið mánakvøldið í býráðshøllini har peningurin, ið inn kemur, fer óskerdur til umlættingarheimið Dáan.

Fundurin í býráðshøllini er almennur og eru øll sjálvandi hjartaliga vælkomin.